# ÓLAVSØKUBRA



**Aftur í ár verða Miðlahúsið og Nólsoyar Pálstorgið karmur um eitt stórsligið tiltak við skemti og góðum tónleiki ólavsøkukvøld frá kl 22. Páll Finnur Páll syrgja fyri at fáa fólk í gott lag, og hæddarpunktið verður, tá Jákup Veyhe fer at halda eina alternativa ólavsøkurøðu.**

Eydna Skaale
Mynd: Jens Kristian Vang

Hóast tað bert eru tvey ár síðani, at tiltakið var hildið fyrstu ferð, so er tað longu vorðið fastur táttur hjá fleiri túsund ólavsøkugestum. Fjøldin, sum savnast í Vágsbotni til skemt og góðan tónleik áðrenn miðnáttarsangin, plagar at vera stór, og tað verður neyvan øðrvísi í ár, nú Páll Finnur Páll og Jakup Veyhe eru á skránni.

Tvey tey undanfarnu árini hava tað verið limir úr Frændum og Terji Rasmussen, sum hava staðið fyri tónleikaliga partinum, men í ár eru nakrar broytingar í so máta, at tað verða vælumtóktu Páll Finnur Páll, sum fara at spæla tónleikin. Teir teljast millum landsins best umtóktu bólkar, og teimum nýtist ikki at taka nógvar akkordir av kendastu løgunum, áðrenn áskoðarafjøldin geylar við. "Herbergið", "Eg" og "Forelskaður sjónleikari" eru bert trý av løgunum, sum fólk hava tikið til sín, og sum tey flestu duga uttanat.

## Við hæddarskrekki

Tað verður upprunamanningin í Páll Finnur Páll, sum fer at blása sínar tónar út av pakkhúsloftinum. Páll Oddur, Finnur og Páll fara at spæla tað, sum fólk vilja hoyra.

– Vit skulu skapa ein góðan stemning, og vit fara m.a. at spæla "Herbergið", tí hann vilja fólk altíð hoyra. Onkur hevur spurt, um vit syngja um Dimmu "Vit eru heimleysir og vit hava ongar pengar", men eg kann sláa fast beinanvegin, at vit syngja um tað ordiliga herbergið, sigur Finnur Jensen í Páll Finnur Páll.

– Kanska vit eisini fara at taka ein fúlan, viss fólk vilja hava tað, leggur hann afturat.

Finnur sigur, at teir eru sera spentir til hesa framførsluna, tí í fjør vóru umleið 10.000 fólk stúvað saman í Vágsbotni, og teir hava aldri spælt fyri so nógvum fólkum.

Páll Finnur Páll verða at hoyra á ólavsøkukonsertini, sum er 27. juli, men tað undantikið, verður hetta einasti møguleiki at hoyra teir á ólavsøkuni.

– Vit fara at halda ólavsøku í ár, og tað er fyrstu ferð í nógv ár. Men vit spæla fegnir til tiltakið hjá Rás2, tí vit vænta, at tað verður tað reina hygg, sigur Finnur.

– Okkara einasta problem er, at vit allir tríggir hava hæddarskrekk, so vit vita ikki ordiliga um vit fara at kunna spæla fyri nervum. Sum skilst skulu vit spæla uppiá einum stativi, so tað eru vit kanska mest spentir uppá. Kanska skulu vit spyrja Eyðun Nolsøe og teir, um teir hava nøkur góð ráð til okkum, um hvussu man ber seg at, tá man skal spæla so høgt uppi.

Hæddarskrekk ella ei, so fara Páll, Finnur og Páll at spæla góðar, gamlar slagarar, sum mannfjøldin á Nólsoyar Pálstorginum kann syngja við til.

## Jákup Veyhe talar

Undanfarnu árini hevur Sjúrður Skaale skemtað, fyrst sum Haraldur og síðani sum Kári Cool.

Í ár verður Sjúrður tó avloystur av makkaranum gjøgnum nógv ár, Jákupi Veyhe, sum ólavsøkukvøld fer at fáa mannfjøldina at flenna. Hann fer, sum hann sjálvur sigur, at halda eina alternativa ólavsøkurøðu. Framvegis veit eingin uttan Jákup sjálvur, júst hvat røðan fer at snúgva seg um, og hann er eitt sindur varin at lyfta lokinum ov nógv.

– Hetta verður ein tala, sum fer at snúgva seg um støðuna í landinum. Hetta er eitt snedigt land, sum vit búgva í. Tað haldi eg, at vit øll kunnu vera samd um. Og tað verður bara snedigari og snedigari fyri hvønn dag, sum fer. Tað fari at leggja dent á í hesi taluni, sigur Jákup, sum tó ikki vil siga meiri enn tað sama.

Men havandi røðaran í huga, ber skjótt til at gera ta niðurstøðu, at óansæð innihaldið í røðuni, so verður tað stuttligt.

*eydna@sosialurin.fo*